# Summir fylla skipini – aðrir draga svart

**FISKIVINNA** Summi skip fáa upp í, meðan onnur tora nóg illa til lands, so lítið, sum tey hava í lastini eftir fulla túralongd á upsaveiði

Vilmund Jacobsen

Trý pør – ella seks partrolarar – landa í Saltangará í morgun.

Besta túrin hava partrolararnir Heykur og Falkur, sum hava eini 420.000 pund tilsamans. Hetta er ein góður túrur á upsa upp á einar 10 dagar. Heykur og Falkur hava eisini eitt sløð av toski.

Polarhav og Stjørnan, sum eisini eru inni í morgun, hava eini 270.000 pund. Túrurin hjá teimum er eisini einar 10 dagar, og hesi skipini hava tí ikki á hesum sinni verið nær til so heppin sum teir umborð á Heyki og Falki hava verið.

Triðja parið, sum landar í Saltangará í morgun, er Jaspis og Ametyst, sum vit kunnu siga næstan hevur drigið svart.

Jaspis og Ametyst, sum annars plaga at fiska væl, hava bert 100.000 pund tilsamans, og tað man vera ein hin vánaligasti túrurin hjá hesum báðum skipum í langa tíð.

Tað er landingarmiðstøðin Kongshavn í Saltangará, sum landar øll seks skipini í dag.

Á Kongshavn vænta tey ikki nakað serligt aftrat hesa vikuna, tí hini skipini, sum plaga at landa í Saltangará, vóru øll inni í síðstu viku.

### Ógvuliga misjavnt

Túrarnir hjá hesum seks skipunum, sum landa í Saltangará í morgun, vísa, at upsaveiðan í løtuni er rættiliga misjøvn, og soleiðis hevur eisini verið yvir eina longri tíð.

Tað vísir seg nevniliga, at onkur bátur rakar á nógvan fisk, meðan aðrir leita og lítið og einki finna.

Sagt verður av havleiðunum, at nógv skrift er at síggja, og rættiliga nógv lív er í sjónum.

### Nógv skrift

Hóast upsaveiðan sum heild er vánalig, siga menn frá rættiliga nógvari skrift á havinum.

Sum skilst, eru teir ikki heilt vísir í, hvat tað er, teir síggja, men talan er helst bæði um hvítingsbróðir, nebbasild og makrel.

- Spurningurin er so, hvar upsin er í øllum hesum, leggja teir aftrat.

Tað eru teir, sum halda, at Havstovan átti at gjørt kanningar úti á havleiðunum fyri at fáa staðfest, hvat alt hetta nógva lívið í havinum er.

*vilmund@sosialurin.fo*




» ... menn siga frá rættiliga nógvari skrift á havinum...

# Nógvir útróðrarfiskur á markn

**FISKIVINNA** Í morgun seldi Fiskamarknaður Føroya eini 44.000 pund av útróðrarfiski á gólvsøluni og sløk 20.000 pund um telefonina. Tvey skip landaðu eisini á Toftum í morgun

Vilmund Jacobsen

Í morgun landaðu tvey skip á Toftum, ein garnabátur og ein minni línubátur.

Garnabáturin Oknin hevði sløk 20.000 pund, og línubáturin Margit hevði góð 20.000 pund.

Veiðan hjá Oknini er havtaska, meðan veiðan hjá Margit er blandað.

### Útróðrarfiskur

Umfram veiðina hjá Oknini og Margit, vórðu eisini 44.000 pund av útróðrarfiski seld á gólvinum á Fiskamarknaði Føroya í morgun.

Hetta er fiskur, sum bátar fingu á útróðri leygardagin.

Umframt tey 44.000 pundini á gólvinum, vórðu eisini sløk 20.000 pund av útróðrarfiski seld um telefonina hjá Fiskamarknaði Føroya í morgun.

Fyri at útróðrarbátar skulu kunna selja um telefonsøluna hjá FMF, skulu nøgdirnar í minsta lagi vera 4.000 pund.

Hjá útróðrarbátum, sum hava eina mini nøgd av fiski, verður veiðan seld um gólvsøluna.

### Tvey línuskip

Harry Benjaminsen, sum starvast á Landingarmiðstøð Føroya á Toftum, væntar, at línuskipini Vesturhavið og Kambur koma inn at landa fríggjadagin.

- Í løtuni er eitt sindur ilt at siga, hvussu hendan vikan annars fer at vignast, men kanska verður onkur landing eisini hósdagin, sigur hann.

*vilmund@sosialurin.fo*

